VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin og hósdagin:
Lot til andøvsgul av norði og sirm ella mjørki av og á. Hitin millum 13 og 17 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av suðri og regn ella mjørki. Hitin millum 14 og 17 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av suðri, sunnudagin hækkar hann upp í vestan. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 10 og 14 stig.

DAGSINS FØROYINGUR

»Gleði meg til Summarfestivalin«

Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, gleðir seg til Summarfestivalin. Í løtuni ger hann seg til reiðar at taka móti gestum, sum koma til Klaksvíkar um vikuskiftið.

Lív Højsted Horsdal
horsdal@sosialurin.fo

Hvussu fyrireikar tú teg til Summarfestivalin?
- Nøkulunda sum øll onnur. Í løtuni máli eg húsini uttan, meðan konan tekur sær av at snøgga húsini innan. Eg gleði meg í øllum førum øgiliga nógv til Summarfestivalin. Serliga gleði eg meg at hoyra David Phelps, sum eg eri hugtikin av.

Væntar tú tær nógvar gestir?
- Ja, eg vænti, at nógv støkka inn á gólvið um vikuskiftið – familja og kenningar. Serliga gleði eg meg til at fáa beiggja mín á vitjan. Vit fara á hvørjum ári saman á Summarfestival.

Hvat gert tú umframt at gleða teg til Summarfestivalin?
- Í løtuni njóti eg bara summarfrítíðina. Eg stákist úti í garðinum, men eftir Summarfestival in fari eg til Fugloyar at taka mær av løttum – at njóta friðin og náttúruna.

Vart tú á ólavsøku?
- Ja, ólavsøkudag var eg ein lítlan túr. Vit gingu í býnum og heilsaðu upp á fólk. Somuleiðis fingu vit midnáttarsangin við, men síðan fóru vit norður aftur.

- Tað var sera hugnaligt. Nógv fólk vóru í býnum, og veðrið var gott ta løtuna, vit vóru har. Men tá tað byrjaði at regna, flýddu vit norður aftur.
Sum Torbjørn Jacobsen segði í kantaturøðuni: á ólavsøku er alt stríð lagt á hillina, og øll eru í góðum lag. Tað er framúr.

Hvørjum ynskir tú at senda eina heilsu?
- Eg ynski at senda øllum, sum koma á Summarfestivalin eina heilsu. Vónandi fáa øll ein góðan og sámiligan festival. Øll skulu vera vælkomin, og vit í Klaksvík ætla at sýna øllum góðan blíðskap.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	10
Qaqortoq	--
Ammassalik	9
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	12
Seyðisfjørður	8
Tórshavn	14
Lerwick	15
Aberdeen	17
London	21
Tromsø	--
Bergen	20
Oslo	--
Stokkhólm	24
Keypmannah.	24
Helsinki	18
Moskva	17
Berlin	24
Warzawa	27
Kiev	21
Bukarest	28
Paris	22
Madrid	34
Róm	30
Malorca	33
Athen	33
Malta	31
Tunis	34
Beijing	31
New Dehli	31
Bangkok	27
Jakarta	29
Sydney	15
New York	32
Miami	31
Los Angeles	22
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	14
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	10

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt lágtrýst, 1002 hPa. við Føroyar fer spakuliga vestureftir og grynnist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi samdøgur. Eitt annað lágtrýst, 997 hPa. yvir Skotlandi fer spakuliga eystureftir.



Í dag:
Eitt hátrýst vestan fyri Írland stendur í stað og ein hátrýstryggur til Íslands verður væntandi yvir Føroyum fríggjadagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 31/7 kl. 06^{00}– 1/8. 06^{00}. Hitin í gjár: 12,0°
Minsti hiti máldur í juli: - -° - Mesti hiti máldur í juli: - -°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,1 mm – mált frá 31/7 kl. 06^{00}– 1/8 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í juli: 0,1 mm

VESTFALLSKYRRINDI

29. juli Mánin longst frá jørðini
2. august Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
1. Aug	00.01	12.18	11.18	23.36	11.33	23.51	02.01	14.18	03.01	15.18	10.33	22.51	09.33	21.51	00.16	12.33	01.16	13.33	-	12.03	01.01	13.18
2. Aug	00.36	13.09	-	12.09	-	12.24	02.36	15.09	03.36	16.09	11.24	23.58	10.24	22.58	00.51	13.24	01.51	14.24	00.21	12.54	01.36	14.09
3. Aug	01.43	14.18	00.43	13.18	00.58	13.33	03.43	16.18	04.43	17.18	-	12.33	11.33	-	01.58	14.33	02.58	15.33	01.28	14.03	02.43	15.18
4. Aug	02.54	15.18	01.54	14.18	02.09	14.33	04.54	17.18	05.54	18.18	01.09	13.33	00.09	12.33	03.09	15.33	04.09	16.33	02.39	15.03	03.54	16.18
5. Aug	03.42	16.09	02.42	15.09	02.57	15.24	05.42	18.09	06.42	19.09	01.57	14.24	00.57	13.24	03.57	16.24	04.57	17.24	03.27	15.54	04.42	17.09

GEVID BLÓÐ

www.sosialurin.fo

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

5 707265 100036 >